

# Meðallønin í norsku frálandavinnuni i 774.000 krónur

**Jan Müller**

19.03.2014 - 10:50

Oljan.fo

Eftir tveimum árum er meðal kontantlønin í norsku frálandavinnu hækkað 52.000 krónur.

774.000 norskar krónur. Tað var meðal kontantlønin í norsku frálandavinnuni í 2012. Tvey ár frammanundan var hon 722.000 krónur. Tað sæst í einari frágreiðing, sum International Research Institute of Stavanger (IRIS) hevur gjørt fyri felagið Norsk olje og gass.

Kontantlønin umfatar ta føstu lønina umframt viðbót, yvirtíð og teknisk ískoyti.

Frágreiðingin vísir, at tær hægstu lønirnar eru í fyristøðufeløgunum, meðan tey, sum arbeiða innan viðlíkahald, liggja í tí lægra endanum. Harafturat vísir frágreiðingin, at

fólk, sum arbeiða í frálandavinnuni, og sum hava hægri útbúgving ella tekniskan fakskúla, fáa tær hægstu lønirnar, sum eru oman fyri 900.000 krónur um árið.

IRIS skrivar, at lønarlagið er sera ymiskt í vinnuni, og kemst tað av, at sáttmálarnir eru sera misjavnir.

Dagens Næringsliv skrivar, at tølini í frágreiðingini hjá IRIS samsvara væl við tøl, sum norski hagtalsstovnurin hevur almannakunngjørt. Tey vístu, at fulltíðarsett starvsfólk í olju- og gassvinnuni tjentu í meðal 65.400 krónur um mánaðin í fjør, og tá var yvirtíð ikki við.